# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Heldur hetta fram, fara heimshøvini at fløða meiri enn 60 sentimetrar í hesari øldini*

*(Abbas Khan, granskari)*

# Grønlandsísurin bráðnar nógv skjótari enn hildið

**Nýggjar danskar mátingar vísa, at innlandsísurin í Grønlandi bráðnar nógv skjótari, enn vísindin hevur hildið higartil**



*Hendan myndin, sum er tikin við tyrlu, vísir týðiliga, hvussu vatnið frá tí bráðnaða ísinum rennur í stórum áum eftir innlandsísinum*

Í dag minkar innlandsísurin fýra ferðir skjótari enn fyri bara seks árum síðani, og tað fer at ávirka haimshøvini, sigur Abbas Khan, sum er granskingarleiðari á Danmarks Rumcenter, ið hevur staðið fyri kanningunum í Grønlandi.

- Til 2004 fóru millum 50 og 100 rúmkilometrar burtur av ísinum í Suðurgrønlandi um árið. Men síðani 2004 er ísurin bráðnaður nógv skjótari, soleiðis at nú fara umleið 300 rúmkilometrar burturav um árið. Vøksturin er sostatt 400 prosent, og tað er ørkymlandi, sigur Khan við Ritzau-tíðindastovuna.

Tey nýggju kanningarúrslitini hjá Danmarks Rumcenter vórðu almannakunngjørd í granskingartíðarritinum Geophysical Research Letters í gjár. Mátingarnar hevur danski stovnurin gjørt saman við lærda Colorado-háskúlanum í USA.

- Heldur hetta fram, at fer vatnið frá tí bráðnaða innlandsísinum í Grønlandi at fáa heimshøvini at fløða meiri enn 60 sentimetrar í hesari øldini, sigur Abbas Khan. ST hevur fyrr mett, at heimshøvini fara at fløða millum 20 og 60 sentimetrar tey næstu hundrað árini. Abbas Khan sigur við Ritzau, at tey nýggju úrslitini vísa, at flóðin helst verður í tí ovara endanum á metingini hjá ST og kanska omanfyri.

Danski granskarin sigur, at veksandi avfall hevur gjørt, at umleið ein hálvur metur av nýggjum ísi er komin oman á miðdepilin á grønlendska innlandsísinum um árið tey seinastu árini. Men hetta mótsvarar á ongan hátt tí, sum fer burtur av innlandsísinum, sigur hann.

Granskingarleiðarin hjá Danmarks Rumcenter vil ikki siga, aum broytingin í innlandsísinum í Grønlandi stendst er av dálking ella øðrum viðurskiftum.

# 14 ára gamal ætlaði hópdráp í skúlanum



**Drongurin hevði savnað sær eina riflu, heimagjørdar granatir, luftvápn og onnur vápn til hópdrápið**

Í gjárkvøldið tók løgreglan í amerikanska býnum Plymouth tann 14 ára gamla drongin, og heima hjá honum funnu løgreglumenninir tað, ið minti mest um eina vápnagoymslu. Har vóru millum annað ein nútímans rifla, sjey heimagjørdar hondgranatir, umleið 80 luftvápn og fleiri knívar.

Undir avhoyringum greiddi tann 14 ára gamli frá, at hann hevði lagt ætlanir um at søkja at einum mungdómsskúla í Plymouth, sum er í statinum Pennsylvania. Hansara fyrimynd var Colombine-atsóknin í 1999, tá tveir skúladreingir skutu 13 fólk.

Fyri bara tveimum døgum síðani særdi ein 14 ára gamal drongur seks fólk í einum skúla í statinum Idaho.

## STUTT SAGT

### Lama vitjar Bush

Týsdagin í næstu viku støkkur andaligi leiðarin í Tibet, Dalai Lama, inn á gólvið í Hvítu Húsunum í Washington at vitja George W. Bush, forseta. Dagin eftir skal Lama vitja amerikonsku Kongressina, sum hevur gjørt av at heiðra hann við einum serligum heiðursmerki. Hetta hevur vakt ans í Kina, har Dalai Lama ikki er serliga væl umtóktur. Ein kinesiskur talsmaður sigur, at amerikanska avgerðin at heiðra Dalai Lama er uppílegging í innanríkisviðurskifti í Kina. Tað sama segði Kina, tá týski kanslarin, Angela Merkel, hitti Dalao Lama herfyri.

### Tíma ikki KT

Hóast danskar KT-fyritøkur leggja seg á knæ fyri at fáa tey ungu at útbúgva seg og at arbeiða innan kunningartøkni, er áhugin fyri hesari vinnugreinini minkandi millum tey ungu. Politiken skrivar, at tað er als ikki óvanligt, at fyritøkur bjóða teimum ungu einar 30.000 krónur um mánaðin í byrjunarløn, men kortini standa meiri enn 6.000 størv í KT-vinnuni ósett, og umleið 100 koma afturat hvønn einasta dag. Samstundis verður roknað við, at danska KT-vinnan hevur flutt umleið 20.000 arbeiðspláss av landinum, tí eingin arbeiðsmegi er at fáa í Danmark.

### Upprunafólk viðurkennast

Í Avstralia sigur John Howard, forsætisráðharri, at verður hann afturvaldur, fer hann at skriva út fólkaatkvøðu, sum skal staðfesta, at aboriginararnir skulu fáa støðu sum upprunafólkið í Avstralia, og at tað skal setast í sjálva grundlógina. Av teimum 20 milliónunum, sum búgva í Avstralia, eru ein lítil hálv millión aboriginar.